# Góð møttøka í Hvalvík

Sunnudagin varð Bergtórur Hjelm Bjarkhamar innsettur í embætið sum sóknarprestur í Norðstreymoyar prestagjaldi.

Bergtórur Hjelm Bjarkhamar varð prestvígdur av Jógvani Fríðríksson, biskupi, í dómkirkjuni 16. januar. Við hátíðarløtu í Hvalvíkar kirkju, skipaði dómprósturin, Uni Næs, nýggja sóknarprestin í embætið, og Bergtórur prædikaði yvir dagsins tekst.

Hvalvíkar kirkja var fullsett, og 12 prestar vóru komnir at heilsa uppá og stuðla nýggja sóknarprestinum á fyrsta arbeiðsdegi hansara.

Fólk úr Musikkskúlanum og Kingo-kórið í Tjørnuvík settu sín serliga dám á løtuna í kirkjuni við tónleiki og sangi.

Eftir gudstænastuna var kirkju- og bygdafólkið boðið í missiónshúsið til ein drekkamunn, har fleiri talur vórðu hildnir fyri nýggju prestafólkunum. Um kvøldið var opið hús í prestagarðinum.



*Nýggi sóknarpresturin prædikaði yvir dagsins tekst: "Jesus blíðkar illveðrið á sjónum", Matt.8,23-27.*



*Hvalvíkar kirkja var fullsett*



*Limir úr Musikkskúlanum spældu undir gudstænastuni*



*Nýggja prestafamiljan: Bergtórur, konan Haldis og dóttirin Femja*



*Prestarnir vóru væl umboðaðir til innsetingargudstænastuna*



*Dómprósturin ynskir nýggja sóknarprestinum tillukku við embætinum*